# 800 FÓLK Í ÓVISSU HJÁ FAROE SEAFOOD



**Fakta**

Feløg, sum eiga meiri enn 5% í Faroe Seafood samtakinum eru hesi:
P/F Notio Framtaksfelag (48,5%)
Vátryggingarfélag Íslands hf (19%)
Framtak (17,5%)
Sp/f 29.03.2006 (7,5%)

**Tað er greitt, at tá ein so stór fyritøka – í einum so lítlum samfelag sum Føroyar – stendur og rillar, skapar hetta nógv órógv millum tey fólk, sum hava sítt livibreyð á virkjum og á skipsdekki. Sosialurin hevur í dag hugt at, hvussu stórt Faroe Seafood samtakið í veruleikanum er, hvussu nógv fólk eru knýtt at hesum virksemi, og hvussu lønir og hýrur býta seg yvir ymisku partarnar av fyritøkuni**

Vilmund Jacobsen

Tá Faroe Seafood ein av fyrstu døgunum í september í ár helt ársaðalfund, har roknskapurin varð góðkendur, gjørdist samstundis greitt, at samtakið í 2009 hevur havt eitt hall, sum er slakar 16 miljónir krónur. Árið fyri var hallið hálva triðju ferð so stórt.

Á ársaðalfundinum, har útskifting eisini var í nevndini, ásannaði felagið, at tørvur er á bøttum fíggjarligum grundarlagi, og at arbeitt hevur verið við eini loysn í longri tíð.

Toftamaðurin, Anfinn Olsen, sum var nevndarformaður í gomlu nevndini, segði formanssessin frá sær, og í hansara stað varð ein annar toftamaður, Ingi Højgaard, advokatur, valdur.

Nýggjur í nevndini var eisini Ali Celebi, og hinir nevndarlimirnir eru Eyðun Olsen, sum er næstformaður, Jónsvein Knudsen og Kristoffur Laksá.

## Enn í óvissu

Fyrst í september í ár segði leiðslan í Faroe Seafood seg vóna, at nøktandi loysn verður funnin á fíggjarliga grundarlagnum í næstum, men nú vit eru komin út í november mánaða, er framvegis eingin hvítur roykur komin úr skorsteininum.

Hetta merkir, at eini 700-800 fólk, sum eru í starvi hjá samtakinum, framvegis bíða í óvissu eftir, hvør lagnan hjá hesi stóru og týdningarmiklu fyritøku í føroyska samfelagnum verður.

Hvussu stór henda fyritøka í veruleikanum er, skulu vit venda aftur til seinni í hesi grein.

At tað ikki hevur verið lætt hjá leiðsluni í Faroe Seafood í langa tíð, sæst bæði á rakstrarliga hallinum undanfarin ár, eins og felagið er fíggjað av tveimum peningastovnum, sum báðir eru farnir av knóranum.

Fyri tveimum árum síðan varð størsti íslendski bankin Kaupting, sum var partur av fíggingini aftan fyri Faroe Seafood, yvirtikin av íslendska fíggjareftirlitinum, og fyri bert fáum vikum síðan varð Eik Banki, sum fíggjar umleið 150 miljónir krónur av skuldini hjá felagnum, yvirtikin av dønum.

Fyrr í heyst varð upplýst, at







*Meðan 500-700 fólk eru knýtt at flakavirkjunum, sigla eini 100-120 mans við skipunum, sum Faroe Seafood eigur – ella eigur part í*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*